OLE2

***HVUSSU YNSKJA FÓLK AT LIVA,*** tá tey gerast gomul og hava hjálp fyri neyðini? Flestu borgarar ynskja at liva í egnum bústaði longst møguligt. Hetta er ein spurningur um lívsgóðsku, og ógvuliga umráðandi er, at fólk eru væl fyri bæði likamliga og sálarliga. Nýggja aldurssamansetingin krevur nýggjan hugsunarhátt og nýggjar loysnir. Tað er neyðugt at dagføra og menna eldraøkið og viðkomandi tænastur.



***OLE2*** verkætlanin setur í verk hugskot, sum komu fram í fyrsta parti av ”Okkara Lív sum Eldri”. OLE2 fer fram í 8 kommunum í fimm londum. Luleå í Svøríki leiðir verkætlanina. Verkætlanin verður framd í tøttum samstarvi við avvarðandi starvsfólk, borgarar, umsiting og politisku leiðsluna á hvørjum staði. Málið er at røkka framtíðarkrøvum, tørvi og ynskjum hjá okkara eldri borgarum.

**Vilt tú vita meira?**
les um verkætlanina á www.ourfuture.eu
ella tak samband við:


***Føroya Kommunufelag***,
kontakt: Sveiney Sverrisdottir, skrivari
ssd@fkf.fo — tel: 590 760

***Landsapotekarin***,
kontakt: Óløf Briem, leiðandi farmaseutur
olof.briem@apotek.fo — tel 213 356

***Nærverkið***,
kontakt: Gunnleyg Durhuus, leiðari f. eldraøkið
gunnleyg@naerverk.fo — tel: 761 200



Northern Periphery Programme 2007–2013

Innovatively investing in Europe's Northern Periphery for a sustainable and prosperous future

European Union
European Regional Development Fund


# Tey gyltu árini
# - og tá tey blikna

OLE2



**Okkara Lív sum Eldri - verksetan**

**www.ourfuture.eu**

Okkara eldraár broytast.
Vit eru betur fyri,
og vit gerast eldri enn
undanfarin ættarlið.

# OLE2 varpar ljós á fýra øki við nýggjum møguleikum og tænastum

## Netverk

At hava vinfólk og at kenna seg sum part av gerandislívinum er týdningarmikið fyri góðan trivnað. Tað er ein samfelags-uppgáva at útvega høli, har eldri borgarar kunnu koma saman uttan hóvasták, og luttaka í ymiskum ítrivi eftir egnum áhuga. Alnótin er eisini ein møguleiki í so máta.



**Mál:**

* at menna eina heimasíðu, har eldri kunnu hittast og fáa kunnleika um felags viðurskifti
* at gera uppskot um hvar og hvussu eldri óformliga kunnu hittast á bygd og í bý
* at eggja til at eldri sjálvi skipa fyri tiltøkum, so sum útbúgvingarskeiðum og sjálvbodnum tiltøkum fyri øll ættarlið.

## Bústaðir og tænastur

Fólk ynskja at búgva heima sum longst. Neyðugt er at viðgera og menna ymsar møguleikar at stuðla hesum. Til dømis fleiri bústaðir, sum eisini eru hóskandi til rørslutarnað, menna og skipa heimatænastur og heilsutænastur. Eisini er tørvur á felags virksemi, serliga tílíkum, sum tey eldru sjálvi hava skapt.

**Mál:**

* at gera eina mynd av best egnaða bústaðnum
* at menna eina skipan, íð alla tíðina verður dagførd, og sum greiðir frá felags tiltøkum, sum eldri sjálvboðin eru saman um
* at gera eina skipan við yvirliti yvir ognir, sum eru tillagaðar.

## Heilsutænastur

Treytin, fyri at tey eldru kunnu búgva heima sum longst, er at vit hava nøktandi heilsutænastur og fyribyrgjandi arbeiði, soleiðis at tey eldru varðveita góða heilsu. Gott samstarv millum land og kommunu er ein fortreyt fyri betri møguleikum fyri, at eldri fáa neyðugu hjálpina, tá tey hava tørv á henni.

**Mál:**

* at fáa samskipan ílag millum tey, sum varða av heilsutænastunum, eitt nú, við at ráðleggja í felag og at samskifta í einari felags skipan
* at útvega eina skipan, sum tryggjar rætta nýtslu av heilivági, soleiðis at eldri trygt kunnu búleikast heima.

## Starvsfólkamenning og tilgongd av starvsfólki

Fyri at bøta um umstøðurnar hjá teimum eldru og avvarðandi er neyðugt, at starvsfólkið innan hetta økið er í støðugri menning. Somuleiðis er neyðugt, at røttu starvsfólkini verða sett til ymisku uppgávunar.



**Mál:**

* at gera eina langtíðarætlan fyri marknaðarføring og tilgongd av starvsfólki
* at skipa eina virkna starvsfólkatilgongd, har málið er at seta fólk við nøktandi førleikum
* at samstarva við aðrar myndugleikar so sum útbúgvingarstovnar og abeiðsávísingar
* at seta í verk ætlanir og skipanir fyri starvsfólkamenning.

## Endamál OLE2

* Nýggj tilboð eiga at verða tikin við í okkara tænastur, so vit alla tíðina eru við í eini natúrligari menning.
* Tiltøkini eiga at fyrireikast soleiðis, at tey lættliga kunnu brúkast í øðrum kommunum.
* Úrslitini skulu leggjast fram á ein hátt, sum eggjar øðrum at fylgja ráðunum frá verkætlanarbólkinum.